UTTAN ÚR HEIMI

# Fyrsti dómurin í 44 ár

**Fyri fyrstu ferð í 44 ár er ein amerikanskur hermaður dømdur til deyða fyri at hava skotið amerikanskar hermenn í krígstíð**

DÓMUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá George W. Bush, forseti, gjørdi av at leypa á Irak, vóru fleiri amerikanskir hermenn ímóti avgerð hansara. Ein teirra var sersjanturin Hassan Akhbar, sum var í tænastu á einari herstøð í statinum Pennsylvania. Tann dagin, innrásin byrjaði, fór Hassan Akhbar eftier einari maskinbyrsu og fleiri granatum. Síðani fór hann yvir til eitt tjald, sum fleiri hermenn vóru í. Tá avtornaði, hevði hann beint fyri tveimum hermonnum og sært 14 aðrar.

Nú er Hassan Akhbar dømdur til deyða fyri gerð sína. Ta avgerðina tók ein hernaðardómstólur gjáranáttina, og hann er tann fyrsti amerikanski hermaðurin, sum er dømdur fyri at hava skotið aðrar amerikanskar hermenn í krígstíð síðani Vietnamkríggið, skrivar AP. Tann seinasti dómurin av hesum slagnum var í 1961.

Ákæruvaldið vísti á, at Hassan Akhbar er muslimur, og at hann leyp á sínar felagar í tjaldinum, tí hann væntaði, at amerikanskir hermenn fóru at drepa aðrar muslmar í Irak-krígnum. Verjarnir vildu vera við, at maðurin er sálarliga sjúkur, men tað helt rætturin ikki.

Verjarnir gjørdu alt fyri eitt av at skjóta dómin inn fyri hægri rætt. Verður Hassan Akhbar, sum er svartur, avrættaður, verður tað gjørt við einari eiturinnsprænging.

# Ógvuslig móttøka



*Tann nýggja irakska stjórnin, sum bleiv skipað hósdagin, hevur fingið eina heldur ógvusliga móttøku. Í gjár brustu ikki færri enn seks bumbur, sum kravdu minst 13 mannalív og særdu fleiri enn 50 fólk. Her í Athamiya-býarpartinum í Bagdad doyðu fleiri fólk av einari sjálvmorðsbumbu.*

# Trot á arbeiðsmegi í Danmark

**Trot á arbeiðsmegi kann órógva búskaparliga framburðin í Danmark, heldur tjóðbankastjórin**

DANMARK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tøl hjá størsta danska bankanum, Danske Bank, vísa, at danskar fyritøkur kappast um at fáa fatur á arbeiðsmegi, og at 30.000 leys størv skulu setast beinanvegin. Samanborið við í fjør er talið á lýsingum eftir fólki umleið 20 prosent størri í ár, og tað er sambært Børsen tekin um framburð í vinnuni og minkandi arbeiðsloysi.

Men trot á arbeiðsmegi kann forða framburðinum, sigur tjóðbankastjórin, Bodil Nyboe Andersen, og hon heldur tí, at tað er neyðugt við nýskipanum á arbeiðsmarknaðinum beinanvegin.

Bodil Nyboe Andersen og leiðslan í Danske Bank eru á einum máli um, at vandi er fyri fløskuhálsum á arbeiðsmarknaðinum, skrivar Børsen.

## Skipa egnan dómstól

Myndugleikarnir í Sudan vilja ikki lata altjóða revsirættin í Haag døma teir, sum eru ákærdir fyri krígsbrotsverk í sambandi við ágangin ímóti sivilfólkinum í landspartinum Darfur. Ístaðin fyri ætlar stjórnin at skipa sín egna dómstól.

ST hevur gjørt ein lista við nøvnunum á 51 persónum, sum eru skuldsettir fyri at hava medvirkað til ágangin í Darfur, men sudanska stjórnin sigur, at hon ætlar sær ikki at brúka listan hjá ST sum annað enn vegleiðandi tilfar í málinum,

ST metir, at ágangurin í Darfur hevur kostað umleið 180.000 mannalív tey bæði seinastu árini. Harafturat eru umleið tvær milliónir fólk rikin frá húsi og heimi, og flestu teirra halda til í vánaligum og trongum flóttafólkalegum í Sudan og grannalandinum Tjad.

## Vinur Bush skal kannast

Rættiliga óvæntað hava republikanararnir í amerikonsku kongressini gjørt av at taka undir við einum kravi um, at ymisk viðurskifti hjá teirra egna formanni, Tom DeLay, skulu kannast.

Tað eru demokratarnir, sum hava kravt kanningina, tí teir vilja vera við, at Tom DeLay hevur brotið tær etisku reglurnar, sum eru galdandi fyri limir í umboðsmannatinginum og senatinum. Eitt nú er komið fram, at Tom De Lay hevur verið og ferðast í Onglandi, Skotlandi, Russlandi og Suðurkorea, uttan at hann rindaði nakað sjálvur. Eitt nú rindaði ein russisk fyritøka ferð hansara til Russlands, og Tom DeLay skal seinni hava hjálpt fyritøkuni á amerikanska marknaðinum.

Republikanararnir hava meiriluta í kongressini, men teir hava kortini gjørt av at slaka fyri demokratunum, sum viðurskiftini hjá Tom DeLay kunnu kannast. Eygleiðarar í Washington halda, at republikanararnir vóru farnir at stúra fyri, at málið kundi fáa avleiðingar fyri teir á kongressvalinum næsta ár, og at teir tí valdu at slaka.

Tom DeLay er úr Texas eins og George W. Bush, forseti, og teir báðir eru vinmenn.

## ES hóttir Microsoft

ES vil vera við, at Microsoft ger sær dælt av sínari ráðandi støðu á marknaðinum og hóttir við at geva fyritøkuni bót, broytir hon ikki framferð.

Í vikuni var fundur ímillum ES-kommiserin í kappingarmálum, Neelie Kroes, og Steve Ballmer hjá Microsoft. Har hótti kommiserurin við at geva Microsoft dagbøtur, sum kunnu koma up í fimm prosent av umsetninginum hjá fyritøkuni, skrivar Reuters.

Í fjør álegði ES Microsoft at gjalda 3,7 milliardir krónur í bót fyri at hava misbrúkt støðu sína á marknaðinum. Samstundis fekk fyritøkan boð um at gera tað lættari hjá øðrum at menna forrit, ið kunnu brúkast saman við stýriskipanunum hjá Microsoft, men ES heldur ikki, at amerikanska fyritøkan hevur gjørt tað, sum henni varð álagt. Tí hóttir ES aftur nú við bót.

Leiðslan í Microsoft vil ikki gera viðmerkingar til málið, men sigur, at partarnir tosa um viðurskiftini, og at samráðingarnar ganga væl, skrivar Reuters.

## Dýrur kjóli

Kjólin, sum Judy Garland var í, tá hon spældi við í filminum "Troldmanden fra Oz", varð seldur á uppboði í London í vikuni, og fór hann fyri hálva aðru millión krónur.

Upprunaliga varð roknað við, at tann blá- og hvítpuntuti kjólin var einar 300.000 krónur verdur, men tann metingin vísti seg at vera alt ov lág, tá kjólin kom á uppboðssøluna hjá Bonhams í London. Tá hamarin fall, var boðið komið upp á hálva aðru millión krónur. Tað er ikki greitt, hvør keyparin er. Kortini varð upplýst, at seljarin hevði keypt kjólan á uppboði í New York í 1989.

Judy Garland var bara 17 ára gomul, tá ´"troldmanden fra Oz" bleiv spældur í 1939. Filmurin gjørdist serliga væl umtóktur í USA.